# Skatta- og avgjaldsmál avgerðir

| Mál nr.: 11/00238 | Lóg: Skattalógin § 79 | Avgerð tikin: 24.11.2011 |
|---|---|---|

## Mótrokning av avlopsskatti fyri 2010 í B-skatti fyri 2006


**Samandráttur:**
Kært er um, at TAKS hevur mótroknað ein avlopsskatt frá 2010 í B-skatti fyri 2006. Mótrokningin er framd sambært § 79, stk. 4, sum ásetir, at áðrenn útgjalding av avlopsskatti fer fram, verður møgulig eftirstøða av persónligum skatti við tilskrivaðum rentum mótroknað. Tað framgongur av upplýsingunum í málinum, at kærarin p.t. skyldar kr. 33.454,70 í B-skatti fyri 2006. Tað er tí ikki grundarlag fyri at seta spurnartekin við tað undirliggjandi kravið.
Vísandi til omanfyri standandi hevur Skatta- og avgjaldskærunevndin avgjørt at staðfesta avgerðina hjá TAKS.


### Avgerð

**Kært er um**, at TAKS hevur mótroknað ein avlopsskatt frá 2010 í B-skatti fyri 2006.

**TAKS** upplýsir í skrivi frá 20. september 2011, at mótrokning er framd eftir vanligum mótrokningarreglum í § 77 í skattalógini.

Um borgarin eigur pening til góðar hjá tí almanna, og TAKS samstundis hevur krøv móti honum, kann kravið heilt ella lutvíst verða goldið við mótrokning.

Av misgáum er upplýst í skrivinum um mótrokning, at avlopsskattur 2010 er mótroknaður til B-skatt 2010. Men avlopsskatturin 2010 er mótroknaður til B-skatt 2006.

### Avgerðin hjá Skatta- og avgjaldskærunevndini

TAKS mótroknar avlopsskattin frá 2010 í B-skatti frá 2006. TAKS vísir í hesum sambandi til § 77 í skattalógini. Mótrokningin má tó metast at vera framd sambært § 79, stk. 4, sum ásetir, at áðrenn útgjalding av avlopsskatti fer fram, verður møgulig eftirstøða av persónligum skatti við tilskrivaðum rentum mótroknað.

Tað framgongur av upplýsingunum í málinum, at kærarin p.t. skyldar kr. 33.454,70 í B-skatti fyri 2006. Tað er tí ikki grundarlag fyri at seta spurnartekin við tað undirliggjandi kravið.

**Vísandi til omanfyri standandi hevur Skatta- og avgjaldskærunevndin avgjørt at staðfesta avgerðina hjá TAKS.**